# So doyligt úti í Grøv

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri, seint um kvøldið upp í ein strúk av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini ælingur, um kvøldið vátakavi. Hitin millum 7 og 10 stig – um kvøldið niður í 2 stig.




Veðrið hósdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði, seinnapartin veksur hann vindin til storm. Kavæælingur og hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðing og kavæælingur, men seinnapartin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.

**Eitt av mongum vøkrum støðum í Klaksvík er grøna økið úti í Grøv**

BARNAGARÐUR
*Orð/mynd: Snorri Brend*

**Klaksvík:** Hagar leita bæði børn og vaksin sær, tá veðrið er til vildar. Og soleiðis varð eisini í góðveðrinum í gjár.

Útibarnagarðurin í Haraldssundi, sum er mannaður við klaksvíksbørnum, hevði henda dagin avgjørt at royna nakað annað.

Vanliga halda tey til í Haraldsstovu í Haraldssundi, men henda dagin skuldu tey so hugna sær í Klaksvík.

Tey møttust øll í Klaksvík og gingu síðani runt ymsastaðni í bÝnum.

Men eftir døgurða fóru tey til høvuðsmálið fyri degnum: Út í Grøv.

Her hugnaðu tey sær í ánni og á bønum, meðan onkur fór rennandi eftir gøtunum.

Hetta er eitt ótrúliga gott stað til børnini. Tað eru tíverri ikki so nógvir góðir dagar, men tá teir so endiliga eru, so mugu vit njóta teir fult út. Og her úti er so sera gott at vera, segði eitt av starvsfólkunum.

Henda dagin vóru 15 børn og trý starvsfólk og hugnaðu sær úti í Grøv.



*Børnini hugnaðu sær í ánni í góðveðrinum í gjár. Jú, hetta er eitt vælegnað stað til børn og vaksin*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 3 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | -2 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 12 |
| Róm | -- |
| Malorca | 18 |
| Athen | -- |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1038 hPa. yvir Onglandi stendur mestsum í stað og mennist. Eitt lágtrýst, 1006 hPa. við Ísland fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani fer um Føroyar mikudagin.




**Í dag:**
Hátrýstið við Írland breiðir seg vestureftir. Ein kuldabrúg millum Íslands og Føroya fer suðureftir og hevur kalda luft við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. $06^{00}$– 19/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 3,8°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 18/11 kl. $06^{00}$– 19/11 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í november: 131,4 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

23. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Nov. | 10.38 | 23.00 | 09.38 | 22.00 | 09.53 | 22.15 | 00.13 | 12.38 | 01.13 | 13.38 | 08.53 | 21.15 | 07.53 | 20.15 | 10.53 | 23.15 | 11.53 | - | 10.23 | 22.45 | 11.38 | - |
| 22. Nov. | 11.22 | 23.57 | 10.22 | 22.57 | 10.37 | 23.12 | 01.00 | 13.22 | 02.00 | 14.22 | 09.37 | 22.12 | 08.37 | 21.12 | 11.37 | - | 00.15 | 12.37 | 11.07 | 23.42 | 00.00 | 12.22 |
| 23. Nov. | - | 12.32 | 11.32 | - | 11.47 | - | 01.57 | 14.32 | 02.57 | 15.32 | 10.47 | 23.18 | 09.47 | 22.18 | 00.12 | 12.47 | 01.12 | 13.47 | - | 12.17 | 00.57 | 13.32 |
| 24. Nov. | 01.03 | 13.35 | 00.03 | 12.35 | 00.18 | 12.50 | 03.03 | 15.35 | 04.03 | 16.35 | 11.50 | - | 10.50 | 23.08 | 01.18 | 13.50 | 02.18 | 14.50 | 00.48 | 13.20 | 02.03 | 14.35 |
| 25. Nov. | 01.53 | 14.12 | 00.53 | 13.12 | 01.08 | 13.27 | 03.53 | 16.12 | 04.53 | 17.12 | 00.08 | 12.27 | 11.27 | 23.44 | 02.08 | 14.27 | 03.08 | 15.27 | 01.38 | 13.57 | 02.53 | 15.12 |

5 707265 100036 >